Polar Sea á land av menniskjaligum ávum

Báðir yvirmenninir fóru av brúnni umleið kl. 21.15 leygarkvøldið 6. november í ti góðu trúgv, at annar fór aftur á vakt sum skjótast. Polar Sea var tá staddur millum Raktanga og Kjalnestanga. Við 10 mila ferð hevði hann beina kós norður gjøgnum Sundini, við hvørgum yvirmanninum á brúnni. Ongin gav Polar Sea ordrar at venda í bakbord við Selatrað. Sjófrágreiðing varð hildin hósdagin í Føroya Rætti.

DIA MIDJORD

Styrimaðurin, Óli Joensen, avmyndaður á veg inn til sjófrágreiðingina í Føroya Rætti hósdagin *Mynd: Thomas*

Sambært sjófragreiðingini í Føroya Rætti hósdagin, so ber til at siga, at tað var ein menniskjaligur feilur, at Polar Sea rendi á flúrarnar uttanfyri Selatrað, leygarkvøldið 6. november, uml. kl. 21.30.

Í teirri góðu trúgv, at skiparin hevur yvirtikið vaktina á brúnni, fer styrimaðurin niður í messuna at skriva undir tollpappírir. Aðrenn styrimaðurin fer av brúnni kl. 21.15, greiðir hann skiparanum frá radarpositiónini og hvar skipið er. Tá hann fer av brúnni stendur skiparin og hyggur í radaran. Styrimaðurin fer niður í messuna at skriva undir tollpappírini. Skiparin fer av brúnni í skiparakamarið stutt eftir, tí hann skuldi fáa sær sigarettirnar, ið lógu á borðinum í kamarinum. Hann trýr, at styrimaðurin fer aftur á brúkvavaktina, tí hann hevði biðið styrimannin skundað sær.

Tá skiparin hevur sett seg við borðið í kamarinum, sær hann styrimannin við ferð koma upp gjøgnum leytaran frá messuni, og er nú slettis ikki í iva, at hesin skundar sær upp aftur á brúnna. Styrimaðurin, ið kemur upp gjøgnum leytaran er á veg eftir gongini og niður í sítt egna kamar. Hann róknar við, at skiparin er á brúnni, og er í góðari trúgv. Sostatt er eingin á brúnni uml. 15 teir seinastu minuttirnar.

Frágreiðing skiparans

Polar Sea hevði landað rækjur í Hirtshals og var á veg til Rækjuvirkið á Øyri at landa seinastu 80 tonsini. Tveir yvirmenn skiftust um vaktina á brúnni. Skiparin, Erland Olsen, og 1. styrimaðurin, Óli Joensen. Vaktirnar vóru seks tímar – við hvørt styttri og við hvørt nakað longri.

Skiparin greiddi frá í rættinum, at hann hevði lagt seg at sova kl. 18.00 og varð vaktur kl. 20.00, tí Polar Sea hevði maskinsteðg. Hann fór á brúnna nakað eftir kl. átta og setti kósina. Teir vóru góð 4 sjómíl úr Eystnesi. Hann gav styrimanninum boð um at halda leiðina fram, tí hann skuldi orna tollpappírir og annað. Var síðani aftur á brúnni tvær ella trýggjar ferðir seinni. Veðrið var gott og Polar Sea sigldi við 10 mila ferð.

Skiparin greiddi frá, at seinastu ferð hann var á brúnni var uml. kl. 21.15. Hann bað styrimannin fara í messuna at skriva undir tollpappírini. «Ger skjott av» greiddi skiparin frá, at hann hevði sagt við styrimannin. Fór síðani stutt aftana niður í skiparakamari eftir sigarettunum. Tá hann sær styrimannin koma upp gjøgnum leytaran, hugsar skiparin ikki meira og verður verandi í kamarinum.

Undir sjófragreiðingini bleiv skiparin spurdur, um hann hevði nýtt rúsdrekka á túrinum. Skiparin segði seg ikki hava nýtt rúsdrekka. Í politiraportini stendur, at tá skiparin stutt eftir varð avhoyrdur, varð mett, at hann als ikki hevði nýtt rúsdrekka. Uppá fyrispurning í rættinum, um hann metti styrimaðurin var ávirkaður, segði skiparin, at tað metti hann ikki.

Frágreiðing styrimansins

Styrimaðurin greiddi frá, at hann hevði vaktina frá kl. 14.00 leygardagin. Skiparin hevði biðið um veking, tá teir nærkaðust landi. Han bleiv vaktur 5 sjómíl úr landi.

Tá skiparin kl. 21.15 kom á brúnna, trúði styrimaðurin at hann bleiv avloystur frá vaktini. Skiparin bað meg fara í messuna at skriva undir tollpappírini. Hann segði seg ikki minnast, at skiparin hevði sagt við seg, »ger skjott av«. Hann avvísti ikki, at skiparin hevði sagt tað, men segði seg ikki hava hoyrt tað.

Eg greiddi honum frá radarpositiónini og hvar skipið var, síðani fór eg av brúnni. Spurdur um hann sá skiparan koma aftana, segði styrimaðurin, at tað gjørdi hann ikki.

Hann segði seg heldur ikki leggja merki til, at skiparin var á kamarinum, tá hann kom upp gjøgnum leytaran. Men legði aftrat, at hann kanska hevði sað hann, um hann visti at hann var har. Tann tankin var ikki til staðar. Trúði skiparin var á brúnni, segði styrimaðurin.

Í kamarinum fekk eg mær nakað at drekka. Millum annað nakrir stórar snapsir, so hyrurin var góður, tá skipið kom í havn eftir langan tur, greiddi styrimaðurin frá. Spurdur um hann hevði drukkið nakað aðrenn, segði styrimaðurin, at tað hevði hann gjørt, men tað var onki stórvegis – nakrar fáar øl.

Tá styrimaðurin hevði fingið okkurt gott niðurum, skuldi hann fara uppaftur á brúnna at vita, hvussu langt skipið var komið. Hesa tíðina rendi skipið á land, men styrimaðurin dugdi ikki at siga, hvar akkurat hann var staddur, tá skipið rendi á.

Styrimaðurin greiddi viðari frá, at tað ikki er vanligt, at styrimaðurin siglir seinasta strekkið, tá farvatnið er trupult. Eg var í góðari trúgv, tí skiparin stóð á brúnni, tá eg fór av brúnni.

Alarmurin ikki frá

Fram kom eisini í rættinum, at dagbókin ikki nágreinliga var førd henda túrin. Umframt kom fram, at eingin dekkari var settur at halda vakt á brúnni, ið vanliga er mannagongdin, tá siglt verður innanlands. Hetta segði styrimaðurin seg kanska hava skyldina í.

Polar Sea sigldi við radarkenning, men alarmurin var ikki settur til. Skiparin greiddi frá, at tá hann fór av brúnni stóð sjálvstýrarin til.

Maskinmeistarin, Eljón Johannesen, varð eisini avhoyrdur. Umframt vóru tríy onnur vitni avhoyrd. Hesi vóru dekkararnir Jóanes N. Dalsgarð og Tórður Olsen. Eitt av vitnunum segði seg ikki hava sað Óla koma í messuna at undirskriva, meðan hitt vitnið segði seg hava sað Óla í messuni.

Guðrun Hansen, systir styrimannin, varð eisini avhoyrd. Hon greiddi frá, at hon hevði ringt umborð á skipið uml. kl. 21.20. Tá hevði skiparin tikið telefonina og sagt, at hann hevði sent Óla niður í messuna at skriva undir tollpappírir. Hon skuldi so ringja aftur seinni.

Enn er eingin ákæra reist í málinum. Um eina góða viku kemur úrslitið av rúsdrekkakanningini aftur úr Danmark.

Eingin var á brúnni at geva Polar Sea boðini at venda í bakbord. Eins og skipari og styrimaður, á hvør sínum kamari vóru í góðari trúgv, var eisini Polar Sea í góðari trúgv, tá hann við 10 mila ferð var á veg norður gjøgnum Sundini

Viðmerkingar til aktuell mál

Trúgvið ikki, at bretsku »oljuserfrøðingarnir« eru nakrir filantropar

Latið oljuna liggja, har hon er, so at okkara eftirkomarar kunnu eiga hana afturfyri tær ræðuligu brotsgerðir, okkara spekulantar hava framt. Bretar hava vit einki at tosa við um – teir eru figgindar okkara

Mong eru dømini í heimssøguni um niðurundirkomnar tjóðir, ið hava bjóðað figgindanum vælkomnum. Ja, ennta nazistar eru bodnir vælkomnir av undirbrotligum stjórnum.

Hvat fer fram her á landi just í hesum døgum? Ju, mánadagin 15. nov. kemur veldug bretsk sonevnd «oljusertfrøðingarnevnd» og skal gista her til hósdagin 18.

Er veruliga nakar í hesum landi so blaoygdur at trúgva, at hetta er ein sendinevnd, sum vitjar okkara niðurundirkomna land einans av filantropiskum orsøkum? Helst eru fleiri, sum halda tað.

Talan er um einki minni enn størsta figgindu Føroya innan komandi oljuvinnu, sum kemur at snodda. Teir vita, at føroyingar buskaparliga eru á knøunum og fara at ganga við til alt.

Bert fáar mánaðir eftir, at bretar sendu amerikanskt skip 17 fjørðingar inn um føroyskt mark at gera kriminellar seismiskar kanningar, eru teir so nasadjarvir at koma at «vitja» okkum, helst leggja okkum lag á, geva okkum góð rað eini komandi oljuvinnu viðvíkjandi.

Onkur tryr helst hesum møsni. Men vita skal alt Føroya fólk, at hetta er enn ein av nógvum ráðagerðum móti Føroyum.

Vit hava einki sum helst at tosa við figgindan um. Ein figginda, sum hevur eittans endamál: At fáa sum mest burtur úr føroyska oljuni. Alt annað er tvætl. Teir koma ikki mannsterkir fyri at hjalpa okkum. Hugsa bert um tey ómililigu marknaðarkrøv, teir seta okkum, júst fyri at trýggja sær sjálvum oljuna.

Her í Norðurlondum er staðfest, at danir fingu ta vanligastu oljuavtaluna við útlendingar, meðan norðmenn fingu ta bestu.

Vert er eisini at leggja til merkis, at í «Frágreiðingini frá Oljurráðgevingarnevnd Landsstýrisins» verður at kalla alt nevnt, uttan tað mest sentrala, nevnliga bytisviðurskiftið millum Føroyar og onnur lond. T.v.s., at vit skulu neyvan rokna við eitt nú at fáa eina helst um helvt avtalu. Heldur kunnu vit rokna við at fáa kanska eitt promillu av urtøkuni, meðan bretar fara avstað við restini.

Sannleikin er tann, at danskir kapitalistar hava niðurbundið okkum. Tí koma bretar nú at tosa við okkum. Løgting og landsstyri hava als einki vald, høast løgtingsmenn tvætla tomt tos í dagavís í svarta sjónleikarhúsinum á Tinghusvøllinum. Vald, ið er í Bruxelles.

Seismiskar kanningar verða gjørdar, og tær verða seldar til hægstbjóðandi. Neyvan eru nevndu kanningar, sum av tilvild vóru uppdagaðar, tær einastu, sum fremmand lond – helst bretar – hava gjørt innan mark okkara.

Vit mugu nú – ikki í morgin – gera okkum púra greitt, at oljan fer ikki at bjarga okkum burtur úr nakrari kreppu. Tað kann einans eitt nýtt samfelag gera.

Kanska onkur minnist aftur til 1974, tá heimsumfatandi olju-«kreppa» var (høast hetta var ein fiktiv kreppa). Her á landi sluppu privatbilar ikki at koyra sunnudag og eftir klokkan 6 á kvøldi. Sunnudagar sást tu úti á gøtunum fólk spáka, sum tu helt vera deyð fyri fleiri árum síðani. Tá kom undan kavi, at USA við sínuni ómetaliga oljurikidømi í mest møguligan mun goymdi sína olju, og heldur nýtti olju úr Miðeystri. Tað var umráðandi, at nýta fremmanda olju fyrst. Tá hon er uppi, hevur USA sína egnu olju.

Hvi gera vit ikki tað sama? Tað er vitleyst at hugsa sær, at vit, sum figgjarliga liggja á knøunum undir danska yvirvaldinum og eru á veg inn í ES, sum ein dønsk blindgørn, skulu fáa eina avtalu, sum hjálpir nakað sum helst upp á sundursorlaða buskapin. Vit eiga at goyma okkara olju nógv ár fram í tíðina. Vit skylda okkara langomnu- og langabbabørnum hetta fyri tær buskaparligu brotsgerðir, sum okkara kraddarar og spekulantar hava framt í navni halovaða marknaðarbúskapsins.

Vit kunnu einans loysa kreppuna sum ein sjálvstøðug tjóð, har fólkið og ikki spekulantar, stýra landinum.

Latið oljuna liggja, har hon er, so at eftirkomarar okkara kunnu eiga hana afturfyri tær ræðuligu brotsgerðir, okkara spekulantar hava framt. Bretar hava vit einki at tosa við um, hvat olju viðvíkir. Teir vóru skjótir at glosma tomu lyttu Churchills til føroyingar eftir Annan Heimsbardaga.

Arnbjørn R. Thomsen.

Fiskurin skal hondskerast

Løgmaður, landsstýrisfólk, politikarar og nógv onnur hava gjøgnum seinastu 20 árini meylað um, at bara vit kunnu verða eina nóg stóra mongd av fiski, so er vælferðarsamfelagið Føroyar bjargað.

At vit tróyttu bæði okkara egnu og aðrar grunnar og sópaðu alt, sum livdi, við øllum teimum mest nýmótans skipum, tólum og amboðum, tosaði eingin um.

Øll henda øgiliga fiskarúgvan skuldi so geva arbeiði til Føroya fólk bæði á sjógvi og landi.

Og fyri at viðgera hesa ómetaliga stóru fiskanøgd skortaði ikki politikarum at geva stúdning og bankum at geva lán til at byggja stórar høllir næstan við hvørt havnarlag og fylla hesar høllir við maskinum, sum høvdu eina orku til at viðgera nógvar ferðir meira, enn vit kundu fiska.

Og allur hesin fiskur fór av landinum sum bert hálvtilgjørd vøra. Keypararnir gríggjaðu sær í hendurnar, tí bert við litlari viðgerð, kundu teir selja henda fisk fyri dupult so góðan pris.

Hesin politikkur – ella hetta mynstrið – er í sjálvum sær berur ørskapur, tí væl goymir havið eitt øgiligt ríkidømi av fiski og øðrum livandi kyktum, men hetta pinkulitla Føroya land við sínum 47.000 íbúgvum hevur ikki loyvi til at rokna sær meira enn ein vissan part av havsins tilfeingi, og vit hava ikki loyvi til at oyðsla við rávøruni og bara kradda inn undir okkum.

Tað er jú beinleiðis vitleyst, at vit skulu fiska eftir framleiðsluorkuni hjá øllum maskinunum, sum vit hava fylt landið við fyri hundraðir av milliónum, og sum eisini kosta nógv at driva.

Alt ov nógvir av okkara politikarum hava als ikki skil fyri húsarhaldi (økonomi), tí er figgjarstøðan í landinum so út av lagi ring.

Í greinastubbum hesi seinastu árini havi eg mælt til, at fiskurin, sum skal skerast til flak, verður skorin við hond. Meðan politikarar og nógv onnur siga bara, at tey ætla sær ikki aftur í miðøldina at viðgera fiskin bert við handakraft.

Og sólufólkini – agentarnir – vita sum er, at bara tey siga fyri fólki, at mótin er soleiðis, at allur fiskur eigur at skerast við maskinum, so faa tey viðhald. Ja, eg havi ennta eisini hoyrt fortalt, at teir, sum selja maskinurnar, hava stungið høvdini saman við teimum, sum keypa flakið, at tey bara mugu keypa flak skorið við maskinu. Ein ondur sirkul.

Onkur, sum arbeiðir á flakavirki, sigur fyri mær, at tað eru maskinurnar, sum stýra arbeiðinum, og ikki arbeiðsfólkið sum stýrir maskinunum. Við øðrum orðum: tað fer ótrúliga nógv fyri skeyti, og tað verður alt ov nógv svinn í mun til, tá hvør fiskur verður hagreiddur við handamegi.

Tað fróddi meg tí almikið, at stjórin á Føroya Fiskavirking nú hetta kvøldið í sjónvarpinum segði bart út, at flakavirkini ongantíð ov skjótt mattu fara í holt við at skera fiskin við hond.

Tá sandmaðkur ella annað brek er við tí einstaka fiskinum, ma tað vera lættari at siggja hetta, tá skorið verður við hond.

Sleppa vit okkum av við meginpartin av maskinunum og gagnnýta allan fisk, sum fæst við Føroyar – og so fáa vit kanska eitt sindur aðra staðni eisini – eri eg av teirri áskoðan, at tað er nógmikið av fiski og øðrum, sum fæst úr sjónum í dag. Hvi kunnu vit ikki sjálv tilvirka svartkjaftin, sum er á Føroya leiðini?

Tá eg sigi, at vit skulu klára okkum við okkara egna sjógv fyri mesta partin, so skal tað ikki skiljast soleiðis, at vit kunnu fara upp aftur á tann livifótin – heimsins hægsta – sum verið hevur í Føroyum nú í nógv ár, men á ein sámiligan livifót sum tilfeingið úr sjónum loyvir okkum.

Tað verður nógv funnist at stjóranum fyri Føroya Fiskavirking, men tá hann hevur fingið fólkið í arbeiði í staðin fyri allar maskinurnar, sum eru ein av orsøkunum til, at alt er farið á heysin, er øll orsøk til at rósa honum.

J.